Álit

í

løgtingsmáli nr. 112/2020: Uppskot til løgtingslóg um at binda H- og B-bygningarnar á Landssjúkrahúsinum saman og um at keypa neyðgenerator, tól og útgerð

Landsstýrismaðurin í heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen, hevur lagt málið fram 5. mars 2021, og eftir 1. viðgerð 10. mars 2021 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 25. mars og 13., 15., 19. og 23. apríl 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, og landsstýrismannin í heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen, saman við Sjúkrahúsverkinum og Landsverki.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Byggiverkætlanin við H-bygninginum er komin væl áleiðis. H-bygningurin og B-bygningurin skulu nú samanbyggjast. Talan er um teir báðar bygningarnar, ið eru klæddir við kopari. H-bygningurin er tann nýggi bygningurin, sum stendur við sjóvarmálan og er klæddur við vanligum kopari. B-bygningurin er tann bygningurin, ið er klæddur við eiraðum kopari og sostatt er eirgrønur á liti. Biðið verður nú um heimild at binda bygningarnar saman. Harumframt verður biðið um heimild at gera avtalur um tann seinna neyðgeneratorin og tól og útgerð.

Nevndin vil vísa á, at við seinastu lógarbroyting í løgtingslóg um at høvuðsumvæla, útbyggja og nútíðargera Landssjúkrahúsið, sí løgtingsmál nr. 44/2019, varð heimild veitt til prosjektering til at binda H- og B-bygningarnar saman.

B-bygningurin hevur 9 hæddir, har sambindingin við H-bygningin verður í trimum av hæddunum. Tað er í kjallarahædd, nevnd 0 (null), í móttøkuhædd, nevnd 1, og á aðru hædd, nevnd 2.

Samlaði kostnaðurin í uppskotinum er 71,8 mió. kr. og kann býtast í tríggjar partar:

1. Samlaði kostnaðurin av at binda H-bygningin og B-bygningin saman er 42,8 mió. kr.
   Mett verður, at 70% av hesi upphædd verður brúkt í kjallarahæddini, 10% í móttøkuhæddini og 20% á aðru hædd.

2. Ein neyðgeneratorur er staðsettur í H-bygninginum, men fyri at tryggja allar kritiskar funksjónir í H-bygninginum er neyðugt við einum afturat.
   Kostnaðurin fyri seinna neyðgeneratorin er 3 mió.kr.

3. Í eini tilgongd, har øll gott og væl 500 rúmini eru gjøgnumgingin við ráðgevum og brúkarum, er komið fram til, at tað vanta tól og útgerð fyri 26 mió. kr.

Ad. 1:
Nevndin undrast stórliga á, at prosjektering og kostnaðarmeting fyri samanbindingina ikki er tikin við í upprunaligu ætlanini, tá H-bygningurin varð prosjekteraður, tí eyðsæð er, at ein samanbinding mátti vera, og varð tað eisini í viðmerkingunum til løgtingsmál nr. 82/2010 nevnt, at rættast er við eini samanbinding í sambandi við nýggja bygningin.
Nevndin kann bara staðfesta, at so hevur ikki verið og heldur tað vera átaluvert.

Ad. 3:
Nevndin vil her vísa á, at 58,1 mió. kr. eru áður settar av til útgerð, innbúgv og list í sambandi við H-bygningin, sí løgtingsmál 47/2016. At nú er brúk fyri nógvum peningi afturat til tól og útgerð, sum lutvíst eisini er innbúgv, tað undrast nevndin stórliga á.
Í skjali 2.d í fylgiskjali 2 verður víst á, at økir hava verið í samskiftinum millum brúkara, byggiharra og ráðgevar, har fullgreið semja ikki hevur verið um fíggingarpartin av ávísum tólum og útgerð. Tað er staðfest í eini tilgongd, har hvørt einasta av teim 505 rúmunum eru gjøgnumgingin saman við ráðgevum og brúkarum. Hetta gevur eina ábending um, at tær greiðu mannagongdirnar hava ikki altíð verið til staðar, og tað heldur nevndin vera átaluvert.
Í eini gjøgnumgongd av umbønini um játtan til tól, tøkni og útgerð (fylgiskjal 2) er komið eftir, at tørvur er á 25 mió. kr., og ikki 26 mió. kr., sum annars stendur í uppskotinum. Samsvarandi hesum mælir nevndin til at lækka upphæddina í uppskotinum við 1 mió. kr.

Nevndin setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1, stk. 2 verður “71,8 mió. kr.” broytt til: “70,8 mió. kr.”.

Nevndin er eisini kunnað um, at sjálvt við hesi upphæddini á 70,8 mió. kr., er verkætlanin ikki liðug, tí í kjallaranum í nýggja H-bygninginum er ætlanin at hava goymslu og parkering. Upp á spurning frá nevndini, varð okkum upplýst, at hægru raðfesting av hesum báðum – goymslu og parkering – tað hevði goymslan, og dentur varð lagdur á, at hon er alneyðug at fáa gjørda. Til spurningin, hvat goymslan og parkeringskjallarin fara at kosta, tá tey vóru liðug, fingu vit at vita, at so leingi, sum hesi ikki vóru prosjekterað, bar ikki til at koma við einum nágreiniligum kostnaði. Tó fekk nevndin at vita, at hetta snýr seg um fleiri tíggjutals milliónir krónur tilsamans, harav goymslan var mett at verða nakað bíligari enn parkeringskjallarin. Nevndin mælir til, at nágreiniliga ætlanin við kjallaranum í nýggja H-bygninginum og samlaði kostnaðurin fyri ætlanina verða tøk skjótast til ber.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 23. apríl 2021

Magnus Rasmussen formaður	Aksel V. Johannesen næstformaður	Jákup Mikkelsen
Bill Justinussen	Jógvan Skorheim	Páll á Reynatúgvu
	Ruth Vang	